## Pelé roknar við Argentina

– Sjálvandi hevur Argentina møguleikan at senda Brasil út í kuldan, um londini hittast í HM-endaspælinum. Tað vóru skelkandi boðini, sum Pelé hevði at bera landsmonnum sínum, tá hann varð spurdur, hvørt Argentina hevur møguleika at vinna HM.

Suðuramerikonsku arvafíggindarnir kunnu í fyrsta lagi tørna saman í hálvfinaluni, so enn er langt eftir á mál, áðrenn svarið hjá Pelé kann eftirkannast.

**-mørk**

## Poulsen til Sevilla

Danski landsliðsspælarin og fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson í FCK, Christian Poulsen, skiftur eftir summarsteðgin til spanska Sevilla. Nógv hevur verið gitt um framtíðina hjá Poulsen, og eitt nú helt spanska Villareal uppá, at teir høvdu eina avtalu við spælaran. Seinni komu tó bæði Inter og Milan við í leikin, men nú verður tað altso hjá spnsku UEFA-Cup vinnarunum, at Poulsen skal royna seg.

**-mørk**

# Ritan snýtti hinar

**Vónin hjá kollfirð-ingum um at vinna ein róður gjørdist ikki til veruleika**

5-MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í Kollafirði høvdu tey vónað, at tað skuldi eydnast dreingjunum umborð á Kolli at verja kappróðraræruna hjá bygdini. Dreingirnir umborð á nýggja Kolli, sum kappaðist fyri fyrstu ferð á Norðoyastevnu, hava einki at skammast við. Men tað eydnaðist teimum ikki at vinna.

Nýggi Jallur hjá Knørrafelagnum hevði bara roynt at vunnið, áðrenn teir fóru til Kollafirðar. Teir høvdu bara kappast á Norðoyastevnu, og tá var Jallur fremstur – eina bátslongd frammanfyri Koll, sum aftur var eina bátslongd frammanfyri Rituna, ið aftur var eina stóra hálva bátslongd framman fyri Havfrúnna úr Vestmanna.

Teir, sum vóru á fýra teimum fremstu plássunum í fyrstu kappingini, vóru eisini á fýra teimum fremstu plássunum á Kollafirði. Stóra broytingin var tann, at Ritan fleyg av triðja og fram á fremsta plássið, og at Jallur og Kollur harvið vórðu trýstir eitt pláss niður á listanum.

**5 mannafør dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ritan | 05:02.19 |
| 2 | Jallur | 05:03.20 |
| 3 | Kollur | 05:05.05 |
| 4 | Havfrúgvin | 05:06.23 |
| 5 | Strípan | 05:11.01 |
| 6 | Sílið | 05:11.16 |
| 7 | Drekin | 05:23.03 |
| 8 | Blikur | 05:24.17 |

Endaspurturin var sera tættur og spennandi. Ritan tók Jall, sum tóktist ætla sær at svara aftur, men tá vóru teir norðuri í Sundi sera knáir.

Í Klaksvík vóru næstan átta sekund frá nummar eitt og til nummar fýra. Hesa ferð var tíðarmunurin frá nummar eitt og til nummar fýra stívliga fýra sekund. Tað boðar frá, at kappingin millum dreingjamanningarnar helst framvegis fer at verða tøtt, og at tað eru fleiri, sum tykjast hava góðan møguleika at vinna.

Úrslitini higartil kundu bent á, at talan verður um FM vinnara, sum ikki hevur roynt hetta áður. Fyrsti Jallurin er spildurnýggjur, og Ritan hevur ongantíð vunnið FM. Kollur hevur ikki verið meistari síðani 1995, og Havfrúgvin vann FM í 1999.




*Tað stóð nógv á, men teir á Rituni megnaðu kortini at vinna gullið í Kollafirði*

*Mynd: Álvur*

# Frúgvin fremst í framúr kapping

**Blikur, sum vann á Norðoyastevnu, datt í Kollafirði aftur á fjórða plássið**

5-MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*

Í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum vunnu tær á Argjum, eftir at tær í Miðvági høvdu verið fremstar í Klaksvík. Í kappingini millum 5-mannafør við gentum tóku tær í Miðvági so at siga sigurin aftur. Blikur av Argjum vann í Klaksvík. Leygardagin var tað Frúgvin úr Miðvági, sum kom fyrst á mál.

Róðurin var so mikið tættur, og tað vóru so mikið nógvir bátar við í kappingini um fremsta plássið, at tað er mugu roknast at vera í hvussu so er tríggir potentiellir vinnarar, tá ið tað leygardagin fer at verða kappast í Runavík.

Á veg fram við bryggjuni vóru tað Frúgvin, Havfrúgvin og Drekin, sum togaðust um fremsta plássið. Á málinum vóru tær úr Miðvági skutin fyrri á mál enn tær úr Vestmanna, sum bara vóru sentimetrar frammanfyri Drekan.

Frúgvin og Drekin vóru ávikavíst nummar tvey og trý í Klaksvík. Ta ferðina vann Blikur. Hjá argjagentum gekk ikki so væl hesa ferð. Blikur endaði á fjórða plássi. Tær vóru í tættari kapping við Hvassa um plássið. Hvassi var ein skut aftanfyri Blik.

Í hagtølunum verður kappingin millum 5-mannafør við gentum roknað sum nýggja kappingin, ið fyrstu ferð var á skránni í fjør. Tá var Blikur meistari.

Undanfarnu kappingarnar í hesi bátastøddini verða flokkaðar sum kappingin millum 5-mannafør við kvinnum. Í tí kappingini var Frúgvin best í 2000.




*Talan var um sera tættan genturóður, og úrslitið bendir á, at vit væl kunnu fáa eina framúr spennandi FM-kapping*

*Mynd: Álvur*

**5 mannafør gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 05:24.12 |
| 2 | Havfrúgvin | 05:25.08 |
| 3 | Drekin | 05:25.11 |
| 4 | Blikur | 05:28.03 |
| 5 | Hvassi | 05:29.02 |
| 6 | Ørnin | 05:32.03 |
| 7 | Sílið | 05:35.11 |
| 8 | Firildur | 05:45.18 |
| 9 | Dúgvan | 05:46.15 |

# Ørnin heldur stílin




*Ørnin var klárt á odda, tá komið varð móti málinum*

*Mynd: Álvur*

**Hóast tað aftur hesa ferð var tætt, so tvífaldaðist fjarstøðan aftur til Sílið, ið aftur hesa ferð var dyggasti kappingarneytin**

5-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Ørnin úr Sandavági hevur vunnið sær tað plássið í kappingini millum 5-mannafør við kvinnum aftur, sum Ørnin so ofta hevur verið á áður. Hagtølini siga, at Ørnin í tíðarskeiðnum 1988-1998 var meistari fimm ferðir.

Síðani hevur Ørnin ikki verið best. Um tað skal metast út frá tveimum teimum fyrstu róðrunum í ár, so eru vánirnar góðar fyri, at tær úr Sandavági eru komnar aftur á gamlar gøtur. Tær liggja á kósini at vinna FM, og tær dylja ikki, at ætlanirnar og viljin eru at vinna.

Á Kollafirði var kappingin aftur tøtt við fremsta avbjóðaran. Hann var – á sama hátt sum á Norðoyastevnu – Sílið. Í Klaksvík var fjarstøðan millum tveir teir fremstu bátarnar eitt lítið sekund. Hesa ferð var Ørnin stívliga tvey sekund undan Sílinum.

Í Klaksvík var fjarstøðan frá næstfremsta bátinum og aftur til tann næsta fimm sekund ella mest sum hálv onnur bátslongd. Ritan, sum hesa ferð endaði á fimta plássi, var nummar trý í ta ferðina. Hesa ferð var Jallur nummar trý, og tað kann væl vera, at Jallur, Junkarin, Ritan og Drekin, sum komu á mál mest sum í einum roki, fara at gera uppafturmeiri um seg. Fjarstøðan frá Drekanum á sætta plássi og fram til tann fremsta var hálv onnur bátslongd.

Men Ørnin var aftur hesa ferð fremst, og nógv skal venda upp, sum nú vendir niður, um tær úr Sandavági skulu missa flogið og koppast av trónuni.

**5 mannafør kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ørnin | 05:18.03 |
| 2 | Sílið | 05:20.12 |
| 3 | Jallur | 05:21.20 |
| 4 | Junkarin | 05:22.13 |
| 5 | Ritan | 05:22.15 |
| 6 | Drekin | 05:23.19 |
| 7 | Tjaldrið | 05:31.05 |
| 8 | Báran | 05:42.15 |